# ur kann virði sítt



## Løgmaður orðar kanningarsetning

**Hóast avgerð nú er tikin um at kanna skuldsetingarnar móti Bjarna Djurholm, er enn ikki greitt, hvør arbeiðssetningurin hjá kanningarnevndini verður**

DAGMAR-MÁLIÐ

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan verður um eina kanning av embætisførsluni hjá Bjarna Djurholm, landsstýrismanni í Vinnumálum.

Somikið stóð greitt, tá Løgmansskrivstovan í gjár sendi út tíðindabræv. Við Sosialin í gjár segði løgmaður, at hann ikki kendi seg kroystan at seta nakra kanning i verk, men at tað var hansara meting, at neyðugt var við eini løgfrøðisligari kanning.

Enn er tó ikki greitt, hvat kanningin skal fevna um, ella hvørjir persónar koma at gera hesa.

– Nú er avgerðin um kanningina tikin, og ikki fyrr enn nú verður farið í holt við at orða arbeiðssetningin fyri hesa, sigur løgmaður.

Hann sigur víðari, at tað enn ikki er gjørt av, hvør skal vera kanningarstjóri, men at hetta sjálvandi eisini skal greiðast, nú arbeiðssetningurin verður orðaður.

## Bjarni setast úr spælinum



Jenis av Rana er burturstaddur og fær tí ikki gjørt viðmerkingar til málið. Tað fær næstformaður floksins, Bill Justinusen, hinvegin gjørt, og hann heldur tað vera gott, at løgmaður nú hevur broytt meining, og setur eina kanning í verk.

Næstformaður Miðfloksins sigur, at tað eru skuldsetingarnar móti landsstýrismanninum, sum fyrst og fremst skulu kannast, tí tað er kjarnin í málinum. – Eg haldi, at málið er so mikið einkult, at tað ikki eigur at taka meiri enn tríggjar vikur at kanna, og at uttanveltaðir løgfrøðingar eisini skulu vera partur av kanningini, sigur Bill Justinussen.

Men aftrat tí haldi eg, sigur Bill Justinussen, at Bjarni Djurholm eigur at setast úr spælinum, meðan kanningin fer fram. – Bjarni Djurholm er jú varaløgmaður, og ímynda tær, hvat hendir um løgmaður fer í feriu. So verður tað Bjarni Djurholm, sum tekur yvir, og kemur hann at hava ábyrgd at kanningini av sær sjálvum, og tað kunnu vit als ikki góðtaka. Eisini bara í leiklutinum sum varaløgmaður hevur hann ávirkan á kanningina, og tað er heldur ikki rætt, staðfestir Bill Justinussen.

**RWD**

Kári P. Højgaard:

## Trúvirðið hjá løgmanni hevur verið størri



Kári P. Højgaard, formaður í Sjálvstýrisflokkinum, heldur, at tað var so smátt við at verða pínligt hjá løgmanni, og at hann átti at tikið ein avgerð í málinum beinanvegin. – Løgmaður átti langtsíðani at havt handla, heldur hann.

– Sjálvandi er tað rætt at seta eina kanning í verk, men eg eri við teimum sum siga, at tað skal vera ein skjóttvirkandi nevnd, tí kanningararbeiðið má ikki draga út, sigur Kári P. Højgaard

Annars heldur Kári P. Højgaard, at málið fekk eina margháttliga vending upp sera stutta tíð, og at trúvirðið og virðingin fyri løgmanni hevur verið størri, enn hon hevur verið í løtuni.

– Tað, sum eg meti, at løgfrøðiligi kanningar bólkurin nú skal gera, er millum annað at fara út og tosa við nevdina í Framtaksgrunninum, landsstýrismannin sjálvan og fólkið hann hevur kring seg, sigur Kári P. Højgaard, formaður í Sjálvstýrisflokkinum.

**RWD**

## Øll mugu vita hvat hetta er fyri nakað



Kaj Leo Johannesen, formaður í Sambandsflokkinum, heldur, at tað er í lagi at ein kanning verður sett í verk. – Tað slepst heldur ikki undan við eini kanning av hesum slagnum, tá ivi verður sáddur um landsstýrismannin, tá hann sigst at hava blandað seg upp í avgerðir hjá Framtaksgrunninum. Eg meti, at hetta er neyðugt, soleiðis at vit øll kunnu fáa at vita, hvat hetta er fyri nakað, staðfestir Kaj Leo Johannesen.

Nei ikki nakran arbeiðssetning at geva kanningarbólkinum, hevur Kaj Leo ikki, men hann heldur at kanningin avgjørt er upp á sítt pláss, og at tað kanska hevði verið rætt at hugt eftir, hvussu kanningarnar vóru gjørdar, tá ið Anfinn Kallsberg gjørdi kanningar av sínum landsstýrismonnum.

**RWD**

## Rætt við eini kanning



Málið koyrdi allatíðina og við so nógvum ymsum vinklum, at eg haldi tað vera rætt av løgmanni at seta eina kanning í verk. Tað sigur Kristian Magnussen, formaður í tingbólki Javnaðarfloksins, um avgerina hjá løgmanni at seta eina løgfrøðiliga kanning í gongd nú.

– Við kanningini fáa vit staðfest, um landsstýrismaðurin hevur gjørt ímóti teimum reglum grunnurin virkar undir, og tað meti eg vera týdningarmikið, staðfestir Kristian Magnussen, formaður í tingbólki Javnaðarfloksins í stuttari viðmerking til Sosialin.

**RWD**

## Mugu koma víðari



Fyrrverandi løgmaður og núverandi formaðurin í fólkaflokkinum, Anfinn Kallsberg, svarar, at tað er skyldan hjá løgmanni at halda eftirlit við sínum landsstýrismonnum, og at tað tí er í lagi, at ein kanning verður gjørd, tá hann beinleiðis verður spurdur um, hvørja viðmerking hann hevur til, at Jóannes Eidesgaard nú setur eina kanning í gongd.

– Tað er ikki serliga heppið, at slíkar ákærur sleppa at vera hangandi, so tí er tað gott við eini kanning, soleiðis at vit kunnu koma víðari, heldur formaður Fólkafloksins.

Spurdur um hann hevur nakað boð uppá, hvussu ein møguligur arbeiðssetningur skal ljóða, sigur Anfinn, at tað hevur hann ikki, og tað er bara er løgmaður suverent sum hevur tað.

**RWD**